VI‹MERKINGAR

# Tann n‡ggi skúlin!



**Andras L. Samuelsen**
*valevni á lista B til Tórshavnar b‡rá›*

Seinastu tjúgu árini hava vit tvær fer›ir sagt “n‡ggja fólkaskúlalógin”, tí hon er endursko›a› og munandi broytt tvær fer›ir. Flestu foreldur kunnu taka undir vi›, at teir fysisku karmarnir í skúlunum eru teir somu gomlu, i› líti› og einki eru broyttir í eitt mannaminni.

Ein av broytingunum er, at floksundirvísingin, sum vanliga hevur veri› tann mest n‡tti undirvísingarformur, ikki er nøktandi. Ney›ugt er í størri mun vi› ymiskum undirvísingarhættum. Undirvísingarhættirnir eru nær tengdir at hølisvi›urskiftunum, og lata seg ikki fremja vi› bert hesum eina flokshølinum til 24 næmingar.

Hetta setir stór høliskrøv til skúlan. Eisini n‡ggj starvsøki, sum eru kravd í lógini, krevja høli.

Ta› er kommunust‡risins ábyrgd, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk!

9. og 10. flokkarnir skulu komandi vár til próvtøku í verkætlanararbei›i. Verkætlanararbei›i er ein arbei›sháttur, i› nógv arbei›spláss n‡ta. Siga vit, at næmingarnir arbei›a saman tríggir og tríggir, skulu 8 bólkar ver›a í sama høli og arbei›a vi› hvør sínari uppgávu. Hetta er ikki arbei›sumstø›ur naka› arbei›spláss hev›i bo›i› sínum fólki.

Skúlarnir klára nóg illa at h‡sa øllum flokkunum í hvør sínari heimastovu. Stovurnar eru eisini mangan ov smáar til 24 næmingar.

Teldan, i› er eitt vanligt ambo› á flestøllum arbei›splássum, skal sjálvsagt eisini ver›a eitt ambo› í tí dagliga arbei›num í skúlanum. Trupulleikin er, at skúlin hevur ikki pláss til hesar.

Arbei›sumhvørvi› og harvi› eisini trivna›urin hjá børnunum og teim ungu eru als ikki nóg gó› í kommunuskúlunum.

Her má koma ein skjótur bati, á›renn okkara skúlaungdómur ver›ur ov nógv afturútsigldur.

Veri eg ein av teimum, sum skulu vera vi› at b‡ta skattakrónurnar komandi valskei›, fari eg at mæla b‡rá›num til at um- og útbyggja skúlarnar, solei›is at teir lúka undirvísingarkrøvunum í lógini.

Størsta kommunan og høvu›ssta›urin eigur at fylgja vi› í menningini av fólkaskúlanum og má bjó›a sínum skúlaungdómi umstø›ur, solei›is at hann kann formáa sær.

Allarhelst átti eitt so fáment samfelag sum okkara at ligi› á odda, hvat arbei›sumstø›um og trivna›i í fólkaskúlunum vi›víkur, síggja vit børnini og tey ungu sum eitt tilfeingi. Tórshavnar kommuna eigur, sum nógv tann størsta, og kanska hin ríkasta, kommunan, at vera fyrimynd á fólkaskúlaøkinum.

# Fari› væl um landsstovnarnar



**Magni Dalsgaard,**
*valevni til B‡rá›i› í Havn*

Jógvan vi› Keldu hevur skilt hvussu nógv landsstovnar tí›a fyri ein b‡.

Hann og borgarnir í Klaksvík berjast fyri at var›veita hesar stovnar, og fáa fleiri afturat. Hetta er rætti hugbur›urin.

Tórshavnar kommuna eigur at fara væl um stovnarnar hjá Landinum. At gera gó›a tilkoyring, gó› parkeringsvi›urskifti, gott busssamband, gó›ar barnaansingarmøguleikar og at planta nærindis hesum stovnum, so starvsfólki› merkir at tey eru vælkomin til hendan b‡.

X vi› lista C

# Tarvamykja og Tórsvøllur



**Klæmint Olsen**
*b‡rá›slimur*

Takk fyri innbjó›ingina HB-stu›lar. Ta› er gott, at onkur hevur áhuga fyri b‡rá›spolitikki.

At tit á hendan hátt seta politikk í samband vi› tarvamykju og sey›asparl b‡ur mær tó eitt sindur ímóti. Satt at siga haldi eg ta› vera naka› fjasut vi› hesum mykju-kappingunum, sum hava vundi› upp á seg. Er ta› so stuttligt, at eitt av Harranum skapt kríatúr ger burtur av sær? Ta› gera vit menniskju jú eisini. Men helst er ta› júst ta›, sum er ta› stuttliga. Eisini súmbolikkurin er skeivur. Í dag ver›ur skiti› á Tors-vøll. Gávuna, sum borgararnir hava lati› fótbóltinum og ítrottini. Orsaki› at eg sigi ta›: Ta› tykist eitt sindur ómenta›.

Sum tit kanska hoyra, eri eg ikki komin higar at tosa nøkrum eftir munni. Hóast nógv mál kundu veri› at trivi› í, fari eg her fyrst og fremst at tala um Tórsvøll.

Sitandi b‡rá› gjørdi skjótt av í spurninginum um Tórsvøll. Helst ov skjótt. Ta› sum bara hev›i veri› ein dreymur, gjørdist eftir stuttari tí› veruleika. Og nú hava vit so Tórsvøll. Men er hann vor›in ein óndur dreymur? Ta› haldi eg avgjørt ikki. Tórsvøllur umbo›ar nógv gott, og í felag fara vit at fáa uppaftur meira burturúr.

Framyvir eigur b‡rá›i› tó at fara meira virki› inn í tilgongdina. B‡urin skuldi hava eitt “stadion”, men einki hendi. Vit í b‡rá›num vildu hava okkurt at henda, og lótu vit tí avger›arrættin yvir til Tórsvallargrunnin. Eisini hvat útsjónd og innrætting vi›víkur.

Ta› gav at bíta, tá i› Tórsvøllur knappliga onga rennibreyt hev›i, sum uppruna-ætlanin annars var. Í stórum skundi var› spurningurin so lagdur fyri byrá›i›. Men tá var naka› seint, byggingin var longu byrja›. Ein meirluti í b‡rá›num valdi so - meira ella minni tvinga› av umstø›unum - at vælsigna avger›ina hjá grunninum. Vit vóru tó tveir b‡rá›limur, i› bó›u um at fáa kanna›, um møguleiki framvegis var fyri rennibreyt, á›renn arbei›i› helt fram. Men líti› nytta›i . Eg haldi framvegis, at rennibreyt átti at veri› í Gundadali, har mi›depilin er fyri ítrott í Føroyum.

Sum er er Tórsvøllur eitt mispr‡›i fyri Gundadal og b‡in. Eingin ivi er um, at Gundadalur mátti gerast ein annar, tá i› Tórsvøllur kom. Hetta áttu øll at gjørt sær púra greitt. Men vi› verandi útsjónd kunnu vit ikki liva, og má alt gerast fyri at bøta um stø›una.

Eftir mínum tykki eigur n‡valda b‡rá›i› at endursko›a Tórsvallarprojekti›. Hetta bæ›i tá i› ta› sn‡r seg um avger›arrættin og fíggingina, umframt møguligar broytingar og útsjónd. Endaliga útsliti› má gerst so nøktandi sum yvirhøvur gjørligt.

Og hetta hava vit bæ›i tí› og møguleika til. Vøllurin fer ongasta›ni, hann kann n‡tast sum er. Lati› okkum tí fara inn í eitt positivt samstarv. Og lati› okkum gera ta› í opin-leika. Ta› tænar ongum endamáli at spæla krógva og blunda. Ta› gevur bara uppruna til illgitingar og illvilja.

Men ein rennibreyt er framvegis á skránni. Og eitt golføki. B‡rá›i› hevur játta› stu›ul til bá›ar ætlaninar. Ta› næsta stóra taki› eigur at ver›a ein skoytibreyt. Ta› hev›i óiva› eisini veri› teimum, i› vanliga ikki í›ka ítrott, til stóra gle›i.

Takk fyri!

(Tala hildin á Tórsvølli leygardagin, tá i› HB-stu›lar skipa›u fyri politiskum fundi í sam-bandi vi› ”mykjukapping”)

# Barnaansing



**Olga Østerø**
*valevni Sambandsfloksins*

Forskúli, barnagar›ur og heimaarbei›andi foreldur.

Ein hevur seinastu tí›ina hoyrt og lisi› nógv um, hvat flokkar og tey einstøku valevnini hava lova› veljarunum. Vit vita, at nógvur peningur skal til fyri at fremja alt ta› í verki, i› fram er komi› í valstrí›num. Kommunan eigur tí at gera eina langtí›arætlan, har ta›, sum hevur størstan t‡dning fyri kommununa, ver›ur prioritera› ovast, og ta› sum hevur minni t‡dning ver›ur at ste›ga til seinri.

Lati› okkum vera positiv.

Ta› er gle›iligt, at kommunan hevur prioritera› skúlarnar og barnaansingina frammaliga seinastu árini. Skúlin á Ziskatrø er komin væl álei›is og vónandi ver›ur hildi› fram vi› hesum arbei›i. N‡ggjur skúli nor›anfyri Ósáskúlan ver›ur fyrireika›ur og vit hava fingi› tveir ansingarstovnar afturat. Dagrøktarskipanin er eisini ví›ka›. Sigast skal, at í øllum hesum hevur Sambandsfloksins partur ikki ligi› eftir.

Tó er enn tørvur á barnaansingarplássum. Kommunan eigur grundøki til barnagar›, og ætlanin er at byggja, tá umstø›ur ver›a til tess.

Á›renn næsta stig ver›ur tiki› vi›víkjandi ansingartørvinum, eigur b‡rá›i› at taka spurningin um forskúla upp. Er tí›in ikki komin, at vit seta forskúla á stovn í kommununi. Forskúli er ikki allan dagin, tí mugu vit hava ansingarsta› til tey børnini í hava tørv fyri tí.

Eitt anna›, sum eg hugsi um, eru tey foreldur, sum ynskja at ansa børnum sínum heima, serliga me›an tey eru smá. Ta› er ikki altí› so stuttligt at ríva børnini upp kl. 7.00, vaska teimum, lata tey í, geva teimum at eta, gera seg sjálvan kláran og so skunda av sta›. Ta› er solei›is vor›i› í dag, at ta› skal meira enn ein inntøka til fyri at klára at uppihalda einari familju.

Um hesi fingu ein stu›ul av einum hvørjum slag, so hev›i bí›ilistin eftir ansingarplássum minka naka›. Hetta kundi ver›i› ein fyrimunur bæ›i fyri hesar familjurnar og kommununa.

Eg vóni, at n‡ggja b‡rá›i› tekur hesar tankar vi›, tá farast skal ví›ari vi› barnaansingarmálinum.

Vali› nærkast, og stundir vera ikki til at skriva meira á hesum sinni. Men eg vil heita á tykkum, gó›u veljarar, um at stu›la listan hjá Sambandsflokkinum t‡sdagin.

Gott val!

# Stengarbrúgvin gerast tí›arhóskandi



**Petur Hans á Høvdanum**
*Valevni til B‡rá›i› í Klaksvík*

Fólkaflokkurin hevur gjørt nógv fyri at betra havnarlagi í Klaksvík, einamest á vestur sí›uni, men nú eiga Stengurnar tørn. Stengarbrúgvin krevur stórar ábøtur. N‡tt bulverk eigur at setast upp skjótast gjørligt, ta› gamla er burtur, og kann stórur ska›i› henda, um ikki ta› kemur í rættlag.

N‡ggj vatnlei›ing og el til útró›arbátarnar framvi› kajuni har bátarnir liggja, tí sum nú er mugu slangur og ledningar fáast úr skúrinum. Heldur ikki eru útiljósini nøktandi, tí fleiri sta›ni á stengarbrúnni er sera myrk og ta› kann seta trygdina í vanda. Hetta er bert nøkur átronkjandi økir, ein kann fáa eiga á, men møguliga eru ta› nógv fleiri og kanska hev›i ta› veri› rættast, at man valdi ein havnanevnd, har bert útró›rarmenn vóru umbo›a›ir, so at teir kundi gera sína hugsan um tingini, sum mangla. Tonkjast má uppá, at ta› er av fiskinum vit liva av og er ta› ein sjálvfylgja at teir fáa so gó›ar umstø›ur sum møguligt at virka undir. Hetta ætli eg mær at arbei›a fyri, um eg fái tann hei›ur at koma inn í B‡rá›i› og sjálvsagt veit eg, hvat eg tosi› um, tí Stengarbrúgvin eg eisini sta›i› har mítt arbei›spláss er. Betur er at standa saman og verja borg í felag, tí á tann hátt kunnu vit fáa umstø›urnar nógv betur á Stongunum.

VI‹MERKINGAR

# Skuldin má burtur, -ongantí› ov skjótt

**Sofus Strøm,**
*Trongisvágur*

Ta› er ikki sørt áhugavert at hyggja eftir valgreinunum, sum skriva›ar eru í blø›unum í hesum døgum upp undir kommunuvali›. Hefti meg vi› at flestu greinirnar eru sera væl skriva›ar, og at valevnini eru sera vælmeinandi í tí tey vi›gera, - og lyftini, tey tróta ikki – tvørtur ímóti, - ta› er gylt av teimum.

At egna vi› gyltum lyftum munnu valla rá› vera til.

Í 21 ár havi eg bú› á Tvøroyri, og mær hevur dáma› sera væl, havi følt meg sum heima. Her b‡r eitt raskt og røki› fólk, sum als ikki er bangi› at smoykja upp um armar tá á stendur, - ta› hevur ta› fleiri fer›ir víst.

Ì øll hesi árini hevur kommunan havt stóra skuld at dragast vi› , og henda minkar alt ov seint, - her er als eingin vilji til sta›ar at fáa hana burtur,- teir sum nú rá›a spæla harrar í húsi í lántum fja›rum, og hetta s‡nist ikki at fáa enda, dansurin um gullkálvin fer at halda fram, um vit skulu taka lyftini fyri gó›ar vørur, sum givin ver›a á prenti.

Funnist hevur veri› at mongum vi› gó›ari grund, sum fari› er fram í farna valskei›i, hetta lati eg fara aftur vi› bor›inum, men eg vil bert siga, at henda glantrileik hava vit als ikki rá› til. Skulu vit gera okkum vónir um, at skattaprosenti› her á sta›num skal lækka, so er eitt at gera, og ta› er einfalt at gjalda skuld okkara ni›ur sum skjótast. Ikki fyrr enn skuldin er fjara› munandi, ver›a líkindi fyri at lækka skattin.

Sambandsflokkurin fer tí ikki at gó›taka anna› enn, at alt ver›ur gjørt fyri, at skuldin ver›ur ni›urgoldin sum skjótast. Flokkurin fer als ikki at gó›taka óney›ugar útbyggingar av nøkrum slagi, sum koma at kosta borgarunum óney›ugan pening.

Ta› er mín vón, at tvørafólk saman taka sær um reiggj, og velja flokk inn í b‡rá›i›, sum vil gera alt fyri at fáa skuldina burtur. Hetta er a›almál floksins til hetta b‡rá›sval.

Vel tí Sambandsflokkin!

# Bústa›artørvurin ver›ur nøkta›ur



**He›in Mortensen**
*b‡rá›slimur og sambandsvalevni til Tórshavnar b‡rá›*

Seinnu árini hevur veri› stórur eftirspurningur eftir grundstykkjum til sethús, og í dag eru umsóknirnar umlei› 180 í tali.

Samstundis sum høvu›ssta›urin veksur allar vegir, eru eisini ney›ug stig tikin til at minka um henda bí›ilista.

Í Hoyvíkshaganum er gjørd ein ætlan, i› fevnir um randarhús og vanlig grundstykki, umframt at bæ›i barnaansingarstovnur og eldrasamb‡li eru vi› í hesi ætlan.

Henda útstykking liggur millum Løgmannabreyt og Klingruna, ni›an móti ætla›a ytra ringvegnum. Øki› er umlei› 112.000 fermetrar til víddar, og tilsamans er pláss fyri 155-160 íbú›areindum, b‡ttar á randarhús og grundstykki, i› eru ávikavist 300, 400 og 500 fermetrar til støddar.

Eisini eru øki løgd av til handlar, barnaansingarstovn og eldrasamb‡li, eins og møguleiki er at gera serligar íbú›ir í sambandi vi› randarhúsini, so hesin n‡ggi b‡arparturin kann virka sum ein sjálvstø›ug eind.

Útstykkingin er fyrsti partur av eini størri ætlan. Tá hon er li›ug, fevnir hon um eitt øki á umlei› 460.000 fermetrar, i› liggur millum Løgmannabreyt, Ytra Ringvegin, Klingruna og Vegin Langa.

Loysnin er so stór og umfatandi, at hon rúmar umlei› 600 íbú›areindum, alt eftir hvussu bygt ver›ur.

Í fyrsta umfari ver›ur fari› undir partin, sum liggur millum Løgmannabreyt og Klingruna, so her eru millum 155 og 160 íbú›areindir, i› ver›a lidnar um minni enn hálvtanna› ár.

Harvi› er verandi bí›ilisti í roynd og veru burturi, men arbei›i› ste›gar ikki fyri ta›, tí mi›víst ver›ur fari› ví›ari, so alt øki› um fá ár er li›ugt og klárt til búseting.

# Hjálp í heiminum



**Jónas Johnsson**
*valevni hjá Sjálvst‡risflokkinum*

Heimarøktin er eitt sera gott framtak til tess at kunna búgva heima, tá i› evnini bila. Men arbei›i› hjá heimahjálparum er ikki málrætta› at betra ella at halda vi›líka likamliga førleikan og nøkur vikna skjótt. Ta› er eisini gott at eldrasamb‡lir og røktarheim eru, men í Havn sum a›rasta›ir manglar kapasitetur. Ta› forklárar skommina, at eldrasamb‡lir m.a. ver›a n‡tt sum røktarheim. Ta› var ikki ætlanin. Nógv eru eisini noydd at innrætta røktarheim vi› hús. Ta› er sjálvandi einki gali› í tí, um ta› er í samsvari vi› ynski›. Men tá i› fólk koma í ney›stø›u vegna atger›arloysi frá myndugleikunum, er ta› ein heilt onnur og syndarlig søga, sum tíverri telur nógv dømir. Hvat er at gera? Stovnar skulu til, men einans at bi›ja um fleiri, er líti› n‡hugsandi og ov lætt – ta› gera øll.

Til tess at betra umstø›urnar til eitt gott lív og fyri at minka økjandi tr‡sti› eftir nevndu stovnum, átti ein vælvirkandi framskygd økisterapi at veri› stovnsett, sum setti nógva orku av til at vi›gera og vi›líkahalda likamliga trivna›in og sjálvhjálpni sum longst. Nógv ver›a óhjálpin alt ov tí›liga. Hjá fleiri eru ov lítlar avbjó›ingar til likamligt ídni. Ta› er m.a. grunda› í lítlari vitan um t‡dningin av muskil og li›røkt, sum ikki er minni umrá›andi enn t.d. tannrøkt. At venja vi› teimum, motivera fyri sjálvvenjingum og at útbrei›a vitan um orsøkir og árin, skuldi veri› einfalt at gjørt naka› munagott vi›. Økisterapeuturin eigur eisini at leggja lag á hjá hjálparfólkinum í húsinum. Og skal hava heimild at kunna avgrei›a smærri hjálpartól skjótt og ómakaleyst.

Tá i› ta› sn‡r seg um afturstig vegna sjúku, kunnu fakfólk í økisterapiini eisini veita lei›beiningar og venjingar. Nevnast kann til dømis uppfylging av at klára seg best møguliga heima aftaná úkriving. Og eisini at virka fyri innleggingarfyribyrging í fyrstu atløgu. Onnur eru, sum fyri størsta partin krevja psykusosiala stimbran og ugga, til tess ikki at kenna seg slept uppá fjall aftaná ymiskan mótgang og einsemi.

Hesum økjum brenni eg fyri, solei›is at koma skulu gó›ar og skynsamar loysnir. Um kommunan skal njóta møguligt gagn av tí, ta› er tín avger› tann 21. november.

# Umstø›ur hjá áhugafeløgum

**Elmar Krosstein**
*valevni Sambandsfloksins*

Tá Sambandsflokkurin heitti á meg um at stilla upp, helt eg, at eg átti at játta hesum, tí áhugin fyri tí, sum hendir í okkara kommunu hevur altí› havt mín stóra áhuga.

Ta› sum eg havi hugsa› mær at tiki› fram, er um ítrótt og tey smáu áhugafeløgini, sum eru í Klaksvík.

Taka vit ítróttin fyrst, vita vit væl, at KÍ fær gó›an stu›ul frá kommununi, alt gott um ta›. KÍ hevur umlei› 400 aktivar limir og ger eitt gott ungdómsarbei›i, sum vit øll eru gla› fyri.

Ein trupuleiki hjá KÍ er, at ta› er ov líti› vi› einum ítróttarvølli. Vøllurin er sera nógv upptikin. Sigast kann, at vøllurin er størsta og besta spælipláss› vit hava, og her ver›ur spælt frá morgni til myrkurs.

Trupuleikin vi› bert einum vølli rakar ikki bert KÍ. Hyggja vit nøkur ár aftur í tí›ina var nógvur firmafótbóltur eisini. Hetta er alt dotti ni›urfyri nú, tí at ikki er pláss fyri hesum. Verandi vøllur er umlei› 100 ára gamal. Tá hugsa ver›ur tann fólkavøkstur, sum hevur veri› og tann stóra áhuga ta› hevur millum fólk at spæla fótbólt, er tí›in nú komin, at fari› ver›ur undir at gera ein fótbóltsvøll afturat (um ikki anna› so ein venjingarvøll).

Svimjihøllin treingir til umvælingar og hevur hon veri› stongd fleiri fer›ir tey seinastu árini. Hetta er sera óheppi fyri svimjifelagi› Ægir, sum ongantí› hevur megna› at fingi› eina sterka elitu upp at standa aftur. Tí vil eg virka fyri, at svimjihøllin sum skjótast fær ta› umvæling, hon treingir til.

Fara vit yvir í fimleikahallirnar, so er sera trongligt har. Mjølnir vi› sínum nógvu meistaraheitum hvørt ár, Klaksvíkar fimleikarafelag vi› sínum umlei› 150 aktivu limum, kvøldskúlin og útleiga›ir tímar. Ta› sigur seg sjálvt, at har má vera trongligt.

Tí eigur b‡rá›i› at arbei›a fyri at skapa karmar solei›is, at øll kunnu trívast. Gevur b‡rá›i› ikki feløgunum gó›ar umstø›ur, trívast limirnir ikki og gevast.

Seinastu árini hava fleiri áhugabólkar stungi› seg upp. Her hugsi eg um feløg sum Bridgefelagi›, RC-felagi›, Fotofelagi›, Bátafelagi›, Krokkfelagi› og Rossafelagi›. Smá feløg hvør sær, men eitt limatal uppá umlei› 150 limir. Ítróttur ella ikki, ta› er líka miki›. Fyri at skapa trivna í hesum b‡i, eiga hesi feløg eisini at fáa umstø›ur og karmar at virka undir.

Ta›, sum eg havi skriva› her, kann tykjast sum at ein bert hevur hug til at krevja. Men vit hava sjálvsagt eisini fingi› nógv, sum vit kunnu gle›ast um. Hugsa vit um ítróttin, so er ta› eitt framstig at hava fingi› sk‡li› vi› fótbóltsvøllin, og ta› skal b‡rá›i› hava tøkk fyri!

Sambandsflokkurin vil virka fyri gó›um trivna›i fyri allar borgarar í kommununi.

Gott val! X vi› Sambandsflokkin!

# Avger›in er tín

**Schumann Hjaltalin,**
*b‡rá›slimurValevni fyri Sambandsflokkin*

Í dag skulu veljararnir í Tórshavnar kommunu kjósa sær umbo› at st‡ra b‡num tey komandi f‡ra árini.

Ofta ver›ur tiki› til, at mín atkvø›a nyttar einki, og at ta› er líkamiki› um fari› ver›ur á val. Hetta er ikki so, ein og hvør atkvø›a telur vi›, og tí er ney›ugt, at ma›ur og kona fara av húsi í dag.

Vi› at sita heima valdagin ert tú vi› til at velja teir ella tey, sum tú ikki ynskir at grei›a atkvø›u fyri.



Ta› nyttar ikki aftan á vali› at gremja seg um, hvussu vánalig b‡rá›smanningin er, tá ein hevur ligi› á tí latu sí›uni vi› ikki at grei›a atkvø›u, ella at ein hevur valt skeivt.

Avger›in liggur hjá veljaranum í dag, og kann hesin dagurin metast sum ein stórur almennur b‡rá›sfundur, men hesin fundur ver›ur bert hildin fjór›ahvørt ár.

Frá tí at valúrsliti› fyriliggur einafer› á midnátt í kvøld, hevur veljarin givi› teimum 13 umbo›unum myndugleika at st‡ra b‡num til tann næsta stóra almenna b‡rá›sfundin um 4 ár.

Tá ta› er so ney›ugt at fáa gó› umbo› í b‡rá›i›, bjó›a vit okkum, sum eru valevni á sambandslistanum, at st‡ra b‡num ta› komandi b‡rá›sskei›i›. Hettar letur seg bert gera vi›, at tit sum taka undir vi› okkum, veita flokkinum dyggan stu›ul í dag.